**(Uppskot til)**

# Kunngerð

**um**

**fylgirættargjald**

Við heimild í § 42, stk. 3 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt, verður ásett:

**§ 1.** Upphavsmaður hevur rætt til viðurlag, tá ið frumeintak av listaverki verður endurselt.
*Stk. 2.* Frumeintak er listaverk, sum upphavsmaðurin hevur framleitt í avmarkaðum tali, ella sum eru framleidd í avmarkaðum tali við loyvi frá upphavsmanninum.
*Stk. 3.* Verður verkið endurselt áðrenn 3 ár eru liðin frá fyrstu søluni, og er søluprísurin lægri enn 10.000 evrur, skal fylgirættargjald ikki rindast.
*Stk. 4.* Fylgirættargjald verður ikki rindað fyri endursølu av bygningum.

**§ 2.** Fylgirættargjald verður rindað við endursølu, um so er at seljarin, keyparin ella millummaðurin arbeiða á listaverkamarknaðinum, eitt nú á einum uppboðsstovni, í einum listaverkahandli ella í eini listaverkasølu. Seljarin ella millummaðurin tekur sær av gjaldinum. Arbeiðir einans keyparin á listaverkamarknaðinum, skal hann einsamallur fáa gjaldið til vega.
*Stk. 2.* Endursøla frá privatpersóni til savn ella listasavn, sum ikki verður rikið við vinningi fyri eyga, verður ikki fevnd av ásetingunum, uttan so at millummaður sum nevndur í stk. 1, luttekur í søluni.

**§ 3.** Tá fylgirættargjald verður roknað út, skal møguligt ómaksgjald hjá seljara ella millummanni takast við. Meirvirðisgjald skal ikki takast við í útrokningini.
*Stk. 2.* Tá søluprísurin skal umroknast til evrur, verður gjaldoyrað á søludegnum nýtt.
*Stk. 3.* Er søludagurin ikki gerandisdagur, verður gjaldoyrað síðsta gerandisdag undan søluni nýtt.

**§ 4.** Fyri at sølan skal verða fevnd av hesi kunngerð, skal søluupphæddin vera í minsta lagi 300 evrur fyri eintakið.
*Stk. 2.* Samlaða fylgirættargjaldið verður ikki hægri enn 12.500 evrur fyri eintakið.

**§ 5.** Gjaldið verður roknað soleiðis:
1) 10 % av tí parti av søluvirðinum, ið svarar til í mesta lagi 3.000 evrur.
2) 5 % av tí parti av søluvirðinum, ið liggur í millum 3.000,01 og 50.000 evrur.
3) 3 % av tí parti av søluvirðinum, ið liggur í millum 50.000,01 og 200.000 evrur.
4) 1 % av tí parti av søluvirðinum, ið liggur í millum 200.000,01 og 350.000 evrur.
5) 0,5 % av tí parti av søluvirðinum, ið liggur millum 350.000,01 og 500.000 evrur.
6) 0,25 % av tí parti av søluvirðinum, ið liggur omanfyri 500.000,01 evrur.

**§ 6.** Rætturin til fylgirættargjald stendur við í 70 ár frá árskiftinum har upphavsmaðurin til verkið doyði, sbr. § 53 í løgtingslóg um upphavsrætt.
*Stk.2.* Tá upphavsmaður doyr, fellur rætturin til fylgirættargjald í arv. Hevur upphavsmaður hvørki hjúnafelaga, lívsarvingar ella testamenti, fellur fylgirættargjaldið til tann í § 7 nevnda felagsskapin.
*Stk. 3.* Fylgirætturin kann ikki avhendast ella sigast frá sær.

**§ 7.** Bert felagsskapir, ið virka við loyvi frá landsstýrismanninum, sbr. § 40 í løgtingslóg um upphavsrætt, kunnu krevja inn fylgirættargjøld.
*Stk. 2.* Bert ein felagsskapur fær loyvi at krevja inn fylgirættargjald í senn.
*Stk. 3.* Felagsskapurin stendur sjálvur fyri innkrevjing og afturbering av gjøldum, og skal so vítt gjørligt umboða øll listafólk innan ávísa listagrein. Eisini listafólk, ið ikki eru limir í felagsskapinum, fáa fylgirættargjald tillutað frá felagsskapinum.
*Stk. 4.* Krav uppá fylgirættargjald móti felagsskapinum fyrnist eftir 3 árum, frá ársenda í tí ári verkið var selt. Skrivlig áheitan hevur steðgandi virknað.
*Stk. 5.* Upphæddir, ið fella til felagsskapin, tað veri seg sambært § 6, stk. 2 ella § 7, stk. 4, kunnu brúkast til at fíggja rakstrarútreiðslur, sum standast av innkrevjing og afturbering, ella til onnur felagsendamál, sum viðtøkur felagsskapsins tilskila.
*Stk. 6.* Mentamálaráðið kann seta treytir til felagsskapin í sambandi við at loyvið verður givið.
*Stk. 7.* Mentamálaráðið kann treyta sær, at broytingar í viðtøkum, meðan felagsskapurin virkar við loyvi frá landsstýrismanninum, skulu góðkennast.

**§ 8.** Teir í § 2 nevndu seljarar og millummenn skulu:
1) árliga senda uppgerð váttaða av grannskoðara yvir sølu, sum er fevnd av ásetingunum um fylgirættargjald, til tann í § 8 nevnda felagsskap, og
2) eftir áheitan frá felagsskapinum veita alla ta kunning, sum er neyðug fyri at tryggja at røtt gjøld verða rindað fyri sølu, sum farin er fram síðstu 3 árini. Henda kunning skal verða send felagsskapinum áðrenn 4 vikur eru farnar frá móttøku av áheitanini.

*Stk. 3.* Hevur felagsskapurin ikki fingið ta í stk. 1, nr. 2 nevndu kunning áðrenn 30 dagar eru farnir, kann felagsskapurin gera eina meting av, hvussu nógv skal verða rindað í fylgirættargjaldi í sambandi við endursøluna og innheinta hetta.

**§ 9.** Kunngerðin kemur í gildi dagin eftir hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið, XX.XX.2013

Bjørn Kalsø
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Lógarteksturin:**
**§ 42**. Upphavsmaður hevur rætt til fylgirættargjald, tá ið eintak av listaverkinum verður endurselt, eitt nú oljuverk, akrylverk, tempera-,vatnlita- ella ikki glinsandi vatnlita- og pastelmálningar, myndverk og tekningar gjørdar við aðrari tøkni, grafisk verk, eitt nú steinprent, koparstunga, skavmyndir og træprent, høggmyndir, tekstilverk, gler- og mosaikmyndir, leirlist, postalínsverk, silvur og gullsmíð, og haraftrat fotografiir. Goldið verður fyri einstøk listaverk, sum upphavsmaðurin hevur gjørt í einum ella fleiri eintøkum ella við loyvi frá honum. Ikki verður rindað fyri bygningar.
*Stk. 2.* Fylgirættargjald verður rindað við endursølu, um so er, at seljarin, keyparin ella millummaðurin arbeiða á listaverkamarknaðinum, eitt nú á einum uppboðsstovni, í einum listaverkahandli ella í eini listaverkasølu. Seljarin ella millummaðurin tekur sær av

gjaldinum. Arbeiðir einans keyparin á listaverkamarknaðinum, skal hann einsamallur fáa gjaldið til vega.
*Stk. 3*. Landsstýrismaðurin ásetir neyvari reglur um viðurlag sambært hesi grein.